# Eitt ø er ikki bara eitt ø

## – marknaðarfólk til Føroya Banka

**Føroya Banki er ein ógvuliga væl grundaður og gjøgnumførdur banki á øllum økjum. Tak til dømis bókstavin ø í navni okkara. Ikki bara eitt ø, men ein væl umhugsað føroysk finessa, rótfest og førleikafest eins og Føroya Banki. Soleiðis eru vit, og hevur tú hug at gerast ein partur av starvsliði bankans, bjóða vit tær starv á marknaðardeild okkara.**

### Starvið

Sum marknaðarfólk í Føroya Banka arbeiðir tú verkætlanargrundað og ert við í toyminum, sum røkir nýggja og unga brand okkara, ið varð ment til samleikaskiftið í 2007. Tú fært bestu umstøður at hvessa tíni evni, eins og tú fært rúm og frið at skipa tínar arbeiðsuppgávur, so at tær hóska til títt arbeiðs- og sinnalag. Tín meginábyrgd verður at marknaðarføra vinnu- og íløguøki bankans og at skipa innanhýsis samskifti okkara. Í hesum seinna er møguleiki at leggja til rættis eina nýggja innanhýsis samskiftisætlan.

### Tú

Tú arbeiðir við eldhuga, dugnasemi og framsøkni, eins og bankin. Tú hevur persónliga slagkraft, sigur tína meining og heldur høvdið kalt, tá ið á leikar. Tú samstarvar væl og dugir at fremja ásett mál saman við tínum starvsfeløgum.

Harumframt hevur tú sjálvandi útbúgving ella royndir í marknaðarføring/samskifti, eins og tað er fyrimunur at hava royndir við verkætlanarleiðslu ella samskipan. Tú hevur góðan førleika at skriva bæði føroyskt og enskt.

### Føroya Banki og marknaðardeildin

Sum fyrsti børsskrásetti banki í Føroyum er Føroya Banki eitt nýmótans arbeiðspláss, ið virkar eftir altjóða virkisháttum. Marknaðardeildin, sum verður tín deild, hevur ábyrgd av samskifti og marknaðarføring bankans. Av spennandi uppgávum, sum deildin hevur staðið fyri, kunnu nevnast 100-ára hald bankans og samleikaskiftið í 2007. Á marknaðardeildini starvast í løtuni fimm fólk.

### Meira at vita

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Poulu M. Kass, leiðara fyri marknaðardeildini, á tel 330 464 ella á pmk@foroya.fo.

Skrivlig umsókn saman við avriti av CV og prógvum skal sendast til: starvsfolk@foroya.fo ella til P/F Føroya Banki, Att: Bjarki Mohr, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn og vera okkum í hendi **í seinasta lagi 13. juni.**

SENDISTOVAN

FØROYABANKI



# Næmingar

## - ein til bókhaldið og ein til innkeypið

Kundi tú hugsað tær lærupláss í einari fyritøku, har nógv er at gera, og har tú ert partur av einum starvsfólkatoymi, ið støðugt strembar eftir at mennast og gerast betri?

Vit leita eftir tveimum ágrýtnum og dugnaligum næmingum at byrja 1. august 2008 ella eftir avtalu. Einum til bókhaldið og einum til innkeypið.

**Førleikakrøv**
Tú hevur lokið studentsprógv, HF, HH ella líknandi. Um tú tekur prógv í summar, ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Vit bjóða**
Eitt spennandi og mennandi lærupláss í einum umhvørvi, har tað snýr seg um at veita eina góða tænastu.

Eru spurningar, ber til at ringja til Óla Reinert, telefon 311161.

Send tína umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 7. juni 2008 til:

P/F Poul Hansen
Postsmoga 3016
FO-110 Tórshavn
Merk brævbjálvan:
"Næmingur"

P/f Poul Hansen er største heilsøla í Føroyum. Umleið 100 fólk starvast í samtakinum, sum varð stovnað í 1927. P/f Poul Hansen umboðar sterk og dygdargóð vørumerki, og umleið 6500 ymisk sløg eru í vøruskránni.

PH
P/f Poul Hansen Heilsøla

sansir.fo

## Bátar til einhvønn tørv



m.a. hendan Antioche 700
7,00 x 2,75 m v/120 hk. Volvo
Báturin er á goymslu
Vælkomin at geva boð.

Vælkomin at ringja 219450 ella senda ein t-post til hpe@kallnet.fo

**SP/F RÚNAR**
Túnagøta 1 · 600 Saltangará
tlf. 219450 · fax 449191 · hpe@kallnet.fo

# Lesið Sosialin -so eru tit við!